
SMS-sakarmálið dregur enn meira út

Føroya Rættur ikki tíð: Bíðar til 1. juli næsta ár



Sakarmálið um, hvør eigur SMS, kemur ikki fyri aftur í Føroya Rætti fyrrenn 1. juli 1991. *Mynd: Kalmar*

Í juli mánaði komandi ár hevur Føroya Rættur sett tríggjar dagar av til sakarmálið, David Eliassen hevur lagt móti Hans Mortensen um SMS.

Høvuðspunktini í sakarmálinum snúgva seg millum annað um ognarrættin til SMS, og pengar, David Eliassen heldur seg eiga til góðar frá teirri tíðini, hann sat sum nevndarformaður í Pf. SMS.

Nógv vitni avhoyrast

Sambært Sorinskrivstovuni verður fyrsti sakarmálsdagurin mánadagurin 1. juli 1991, og verður so hildið fram tveir dagar aftrat – 2. og 3. juli – ella so leingi tað tekur at avhoyra vitnini í sakarmálinum.

Og sum skilst, verða tey ikki so fá.

Akkurát hvussu nógv vitni skulu avhoyrast, veit Sosialurin ikki, men frá Sorinskrivstovuni verður sagt, at listin við vitnunum er langur.

At sakarmálið nú enn einaferð verður útsett, er neyvan nakað, ið hugar Hans Mortensen, sum týsdagin segði í Sosialinum, at hann og sakførari hansara í eitt ár hava roynt at fingið eina avgerð tikna í sakini, men at tað hevur verið vónleyst:

Málið drigið út

»Hin parturin, David Eliassen og sakførari hansara, roynir at draga málið út,« segði Hans Mortensen við Sosialin.

Orsøkin til, at málið nú enn einaferð er útsett, er at David Eliassen ikki møtti í Føroya Rætti mánadagin.

Í staðin legði Halgir Winther Poulsen hansara vegna fram eina læknaváttan, ið segði, at hann ikki fekk møtt orsakað av sjúku.

At sakarmálið so aftur má bíða í heilar níggju mánaðir fram til 1. juli komandi ár, kemst av, at Føroya Rættur hevur so nógv mál fyri, at heilt einfalt einki pláss er fyri hesum sakarmálinum fyrrenn tá.

hj.

Leguhúsið hjá Heimamissiónini í Nesvík:

Sperrurnar upp í dag

Nú er komið so mikið langt áleiðis við leguhúsinum, sum Heimamissiónin letur byggja í Nesvík, at seinastu sperrurnar koma upp í dag.

Hetta er fyrsta byggistigið, menn nú eru í holt við at gera. Samanlagt skal leguhúsið verða í trimum byggistigum, harav tey bæði seinnu neyvan verða gjørd í nærmastu framtíð.

»Sum er, hevur alt gingið uppá besta máta, og higartil hava vit klára allar okkara figgjarligu skyldur,« sigur Jákup Kass, formaður í Heimamissiónini. »Við gávum, ymsari hjálp og studningi frá landinum eru vit komin so langt, at vit nú miðja fram ímóti, at fyrsta byggistigið skal verða innilokað, áðrenn veturin kemur av álvara.«

Kostnaðarætlan fer at halda

Hann sigur við Sosialin, at hetta fyrsta byggistigið, sum við øllum er metti at kosta einastaðni millum 25 og 30 milliónir krónur, fer at halda kostnaðarætlanina rættiliga væl.

Har verða knappliga 100 seingjarpláss, umframt at møguligt er at sova á legum í fleiri størri stovum.

»Við hesum fyrsta byggistiginum fara vit at fáa eitt leguhús, sum kann brúkast til alt tað vanliga virksemi, sum er á legum, skeiðum og øðrum tiltøkum, vit plaga at skipa fyri,« sigur Jákup Kass.

Modell av leguhúsinum hjá heimamissiónini í Nesvík, sum tað fer at siggja út, tá øll trý byggistigini eru liðug. Í dag verða seinastu sperrurnar í fyrsta byggistiginum settar upp, og væntandi verður tað endaliga tikið í nýtslu í 1992.

Endaliga klárt í 1992

Eftir ætlan verður fyrsta byggistigið klárt at taka endaliga í nýtslu í 1992.

Arbeiðið varð boðið út í trimum, og í øllum førunum var Dekkon bíligast, so Dekkon hevur gjørt alt arbeiðið, sum gjørt er.

Sum sagt er ætlanin at bíða við teimum báðum seinnu byggistigunum, men annars er alt klárt – spreingiarbeiði og útgrevstur.

hj.

Hesi gera leguhúsið

Tað er danski arkitekturin Jacob Mortensen, ið hevur gjørt upprunaligu skitsuna til leguhúsið í Nesvík. Hann hevur drúgvar royndir innan slíka bygging niðri.

Verkfrøðingastovan í Havn hevur gjørt verkfrøðingaarbeiði og hevur eftirlitið við byggingini.

Arbeiðnum higartil hevur Dekkon staðið fyri.

Umframt alt hetta, er ein hópur av gávum og hjálpandi hondum við til at byggja húsið.

